## Tíggjundi partur:

# Litsvar til opning 1 UT

Tað er ikki altíð, at spælast skal í UT, sjálvt um tað at byrja við, varð opnað í UT ! Sum makkari til UT-opning hevur tú t.d.:

1. ♠ 1087652 ♥ 3 ♦ B862 ♣ 84

Hendan spælihondin fær ikki nógv stikk í einum UT-kontrakt ! Men er spaðari vorðin trumfur, er liturin gullið vert. So tað gert tú – heilt einkult við at melda 2 ♠
Men hvat nú, um makkari, tann glaði optimisturin, sær gull og grønar skógir og meldar víðari, ja enntá meldar 3 UT ?
Svarið er, at tú sum makkari hjá UT-opnaranum er kaptajnur! 2 í liti aftaná 1 UT er eitt tekin um, at nú skal steðgast, reytt ljós, stopp! UT-opnarin skal virða avgerðina hjá kaptajninum. Til tína melding krevst ein 5-lita hond, men meldingin sigur einki um styrki (HP), tvørturímóti.
Ein nakað styrkt hond, ger so væl:

2. ♠ 8 ♥ KB10852 ♦ ED6 ♣ 763

Tín hond er sterk nokk til útgang – minst til at geva tær eini tvey eyka stig av tí einsamalla spaðaranum (singelton) kombinerað við 6-litinum. Men kontraktin 3 UT er sera ósikkur við tíni skeivu fordeiling. Hvussu nógvar hjartarar hava tú og makkarin íalt? Hava tit nokk til at gera litin til trumf ?

UT-opnarin lovar minst doubleton, og hava tit tá í minsta lagi átta tilsamans. Tit hava sostatt bæði stig og trumfir nokk til útgang, so loysnin er einføld: Melda 4 ♥ !
Og síðan ein triðja hond:

3. ♠ EK984 ♥ D73 ♦ B1053 ♣ 8

Hondin hevur styrki til útgang. Hvat við 3 UT? Trup–ulleikin er, at tit væl kunnu hava 8-9 spaðarar tilsamans, meðan kleyvarliturin er vítt opin. Hvat tá við at loypa í 4♠? Nej, tá er vandi á ferð, av tí at makkarin møguliga einans hevur tveir spaðarar, og tá hava tit bert tilsamans sjey kort í spaðara – ikki gott Tí er hetta galdandi:

**Kaptajnurin má taka UT-opnaran við upp á ráð!**
Hetta ger makkarin hjá UT-opnaranum við at finna eina aðra meldiloysn, nevnliga við at melda 3♠ Hendan meldingin nevnist eitt lop – meldingin 2♠ verður umlopin! Hendan lopmeldingin nevnist eitt krav: UT-opnarin skal velja ímillum tveir útgangir, 3 UT ella 4 ♠.
Avgerðin hjá honum verður stýrd av tali av trumfum: Við einans tveimum meldar hann heldur 3 UT, men við trimum ella fýra trumfum er 4♠ rætta kontraktin.

**Eitt kravmeld inniber, at makkarin ikki má melda Pass.**
Her eru tvey dømi har meldini higartil eru:

| Norður | Eystur | Suður | Vestur |
|---|---|---|---|
| 1UT | pass | 3♠ | pass |

Tú situr í norður, hvat er títt næsta meld, tá ið tú hevur hondina A ávikavist B

A: ♠ 65 ♥ E1095 ♦ KD4 ♣ EDB7
B: ♠ D105 ♥ EKB2 ♦ KD4 ♣ D93

Við hond A. endar UT-opnarin við meldinum 3 UT, meðan hann við hond B. fer í 4 ♠

**NIÐURSTØÐA:**
**2 í liti ella útgangsmelding frá svarara: Skiparin hevur talað, makkarin meldar pass.**

**3 í liti (aloftast majorlitirnir, ♠ og ♥): Skiparin biður opnaran velja**
Vit skulu nú hyggja eftir fleiri dømum. Makkarin hjá tær hevur opnað 1 UT:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 4. ♠ B982 | ♥ D10872 | ♦ 6 | ♣ 843 | Melda 2 ♥ |
| 5. ♠ KDB982 | ♥ - | ♦ E105 | ♣ 7652 | Melda 4 ♠ |
| 6. ♠ 8 | ♥ B873 | ♦ D984 | ♣ 7632 | Melda Pass |
| 7. ♠ K98 | ♥ EDB86 | ♦ B82 | ♣ 107 | Melda 3 ♥ |
| 8. ♠ 98 | ♥ E7 | ♦ KDB872 | ♣ 982 | Melda 3 UT |
| 9. ♠ 72 | ♥ EB8 | ♦ KD6 | ♣ KD873 | Melda 3 ♣ |

Í dømi 4. steðgar svarari í 2♥, meðan hann í 5. avger at fara í útgang. Í dømi 6. hevur svarari eina skeiva hond, men hann kann ikki velja eina trumflit, av tí at hann ongan 5-lit hevur, og meldar tá Pass. Við hond 7. tekur Kaptajnurin makkara við uppá ráð og biður hann velja ímillum 3 UT ella 4♥.
Í dømunum 8. og 9. hevur svarari langlit í minorlitunum (♦ og ♣). Men útgangur í minor – 11 stingir – er ein "delikat" støða – tvey stikk fleiri. Tí velur skiparin í 8. útgang í 3 UT. Hond 9. er so sterk, at tað kann vera hálvslemmur við maksimum og kleyvaratilpassningi hjá UT-opnara.
**Lop til 3 í minor er eitt avorligt tilmæli til at melda slemm!**

## Spurningar

Makkarin hjá tær hevur opnað við 1 UT. Hvat svarar tú? Svørini standa á høvdinum hinumegin á síðuni.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. ♠ KD762 | ♥ K9 | ♦ 63 | ♣ E1084 |
| 2. ♠ EB74 | ♥ D982 | ♦ 5 | ♣ 9854 |
| 3. ♠ 7 | ♥ KD10764 | ♦ 987 | ♣ ED9 |
| 4. ♠ EK98 | ♥ D83 | ♦ KD76 | ♣ 87 |
| 5. ♠ 65 | ♥ EB | ♦ 1042 | ♣ KD9843 |
| 6. ♠ B96 | ♥ 10875 | ♦ B9873 | ♣ 9 |

*Høvuðskelda Villy Dam, Bridgevejen 1*
*føroyskað hevur Jens Pauli G. Nolsøe*

**Svør við uppgávum:**
1. Melda 3 ♠ og lat UT-opnaran velja ímillum 3 UT og 4 ♠
("Hevur tú fleiri enn tveir spaðarar, makkari ?")
2. Melda Pass. Tú hevur ongan 5-lit.
3. Melda 4 ♥ Tit hava stig til útgang og harafturat í minsta lagi 8 trumfir.
4. 3 UT. Tú hevur ongan 5-lit.
5. 3 UT. Tað skulu 2 stikk fleiri til útgang í kleyvara.
6. 2 ♦ Eitt stoppmeld – Kaptajnurin hevur talað !

Kláraði tú 4-6 av uppgávunum ? Flott !